




Vit sóknast eftir arkitekti, byggifrøðingi
ella teknikara við aðrari viðkomandi útbúgving.

# ARKITEKTUR / BYGGIFRØÐINGUR

Ert tú áhugaða/ur í avbjóðingum á einari teknistovu, har tú fært møguleika sjálv/ur, saman við øðrum, at menna títt arbeiðspláss, og har arbeiðsumstøður og arbeiðsumhvørvi verða sett í hásæti?

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna millum annað um:

- um- og nýprojektering av bygningum
- vega- og anleggsprojektering
- projektgransking
- útbjóðingar
- fakeftirlit og byggileiðslu
- uppmátingar og avsetingar av verkætlanum við GPS- útgerð.

**Førleikakrøv**
Vit rokna við, at tú ert opin og fyrikomandi, at tú hevur góð samstarvsevni og ert hugað/ur at arbeiða sjálvstøðugt við áðurnevndu arbeiðsuppgávum. Best er, um umsøkjarin hevur royndir frá teknistovuarbeiði, men er hetta als ikki nøkur treyt. Hevur tú nýliga fingið tína útbúgving og brennur fyri teknikarayrkinum, ert tú vælkomin at søkja.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða eftir nærri avtalu.

**Umsókn og freist**
Umsókn við avriti av prógvi, lívsgongdarlýsing (CV) og møguligum viðmælum, skal sendast til niðanfyristandandi adressu og vera okkum í hendi í seinasta lagi 10. apríl 2007.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

EM Ráðgeving Sp/F · Heiðavegur 15 A · FO- 600 Saltangará
Tel 47 77 00 · Faks 47 77 01 · emr@emr.fo

EM RÁÐGEVING

KREA.FO · TEL 47 80 80